# og skrúðklødd – París

Ráðini frá konduktørunum í undirgrundarbreytini eru, at vit aka víðari fram á leið, og at vit skulu smoyggja okkum fram í dagsljósið aftur við hin stórfingna Sigursbogan, sum De Gaulle so spelkin kom marsjerandi ígjøgnum, táið teir sameindu og frælsisstríðsmenn Fraklands endurvunnu París frá týsku hertakarunum í 1944. Hernaðarparadurnar á einum sjónvarpsskíggja formáa sær lítið ímóti tí, sum her brestur í eyguni - live. Hernaðarísinkram í heimsklassa og ivaleyst hava fraklendingar smíðað tað mesta av hesum sjálvir. Tanks, hernaðarvognar, m.a. hjá ST-herliðunum, maskinbyrsur, revolvarar, løgreglubilar- og motorsúkklur og alvápnaðir menn á hestbaki. Íbúðirnar fram við Champs-Élysées avenýuni eru helst dustsúgvnar fyri alt ófrættakent materiel, og á tøkunum standa menn búnir til aktión, skuldi onkur leigumyrðmaður stungið seg fram úr fjøldini. Tað hevði ikki verið gamansleikur, fall tjóðarinnar oddviti á valinum undir hesum tjóðarinnar klimaksi. Slíkar royndir eru gjørdar áður, m.a. táið søkt varð at einum bili, sum táverandi forseti landsins Charles de Gaulle sat í. Funnin vóru 187 skot í bilinum, men tíanbetur kom hesin stóri politikarin undan við lívinum, einasta skurslið hann fekk av tilburðinum, var táið hann skuldi lempa allar glasleivdirnar av kjólanum hjá konuni Yvonnu. Hetta var, táið Algier-stríðið stóð uppá tað harðasta, og forsetin var komin í klinsj við kolonialistisku generalarar í Norðurafrika, sum ikki skiltu, at maðurin sum bjargaði Fraklandi eitt heiðurspláss í heiminum undir og eftir seinru stríðsárini, so avgjørdur læt hjálondini nýta sín sjálvsagda sjálvsavgerðarrætt til at taka loysing frá Fraklandi.

Nú er liðið nakað fram eftir degi. Alt er farið at flyta seg, skipað, hvør bataljón fyri seg, og brádliga kemur ein takleysur bilur við ferð frá Triumfboganum oman ímóti Concorde plássinum. Forsetin stendur uppi, og gesturin situr við lið hansara, og brádliga er lofthavið á tremur við jarndrekum. Mirageflogførini fara sum ørvar ígjøgnum lofthavið beint omanfyri skallabeinini á okkum, flutnings- og bunkringarflogførini somuleiðis



*Generalurin og politikkarin De Gaulle í bronsu á Champs Élysées*

og síðani kemur ein dalsaki av grønum hernaðartyrlum. Makan til spektakkul skal mann leita leingi eftir. Kæti er á fólki, og so hvørt sum vit skríða omaneftir í hesum mannahavinum, renna vit okkum í eitt herlið frá fremmandalegiónini. Sjálvt hesir ísakøldu kalarnir taka sær av løttum ídag. Onkur roykir eitt ball, og sjálvt teirra at kalla glerstoyttu glasandlit hava lyndi til at smírast í góðveðrinum. Teir hava tikið hornensemblið við sær, og hevði mann ikki vitað betur, so kundi tað eins væl verið Frelsunarherurin, sum var ávegis til eitt gøtumøti, eins og vit kenna tað á Ólavsvøku. Táið vit vóru komin oman til stóru bronsustandmyndina av Charles de Gaulle spýttu mirage-flogførini tricolorulitirnar út úr jettmotorunum, og tá var ikki eitt eyga turt í býnum. Fransmenn síggja stórleikan í síni egnu tjóð. Nationali stoltleikin er øgiligur, og hendan dagin sóu vit, at teir hava nóg mikið av ísinkrammi til at verja statin, kosta hvat tað kosta vil. Ein Pétain hevði ikki havt kjans fyri at fóta sær aftur í hesi fimmtu republikkini.

Frídagur er, og fólk taka sær av løttum. Almenna hátíðarhaldið varir í einar fýra tímar, men fólkið flytur seg sum stórar áir framvið áarbakkunum á hini kendu ánni Seine - allan seinrapartin og á kvøldi við. Popporkestur og fólkatónleikarar spæla á ymsum pallum, fortúnskaffistovurnar eru tjokkfullar av fegnum frans-monnum og fremmandafólki, sum leska sær vælindini í nógvu lýkkuni, og sum er komið higar at síggja, hvussu mann pallsetur eina tjóðarhátíð. Onkur sleppur sær upp í bíðirøðina við Eiffeltornið, men at standa sum ein sveittandi saltsúla í fýra tímar hóvar mær ikki, so eg velji heldur at taka alla leiðina heimaftur á gistingarhúsið. Lógin um vinnuligan fiskiskap krevur, at landsstýrismaðurin leggur uppskot fram um áseting av fiskidøgum Ólavsvøkudag, so eg sessist undir meg á hesi jarnhørðu briksini og fari undir at snikka uppskotið til, saman við umsitingini umvegis teldusamskifti – fræga umsiting-in, sum situr hundraðir av fjórðing-um norðanfyri festivitasið, ið her gongur sína sigursgongd, dygst við Bastilleplássið har alt byrjaði.

Tíðin er farin at ganga undan. Men tað ber ikki til at hava verið í hesum staði, uttan at hava upplivað Versailles, Panthéon, Louvre, Notre-Dame kirkjuna og Sorbonne Universitetið. Morgunin eftir gongur leiðin út til Versailles slátrið, ófatiliga stórsligið, men samstundis ímyndin av fáfongd og royalari dekadensu. Tað var her, at herlið av undirsáttum klæddu kongshjúnini og putraðu teimum omaná lortaskónirnar. Urtagarðurin so víður sum fleiri kongsfesti og gull, málningar og alskyns glitur. Og hin kendi spegilssalurin, marmaragólvini og tungu ljósakrúnurnar úr loftinum. Helst byrjanin til endan hjá einum stjórnarlagi, sum sat so langvegis frá vanliga fólkinum, at gjógvin, ella dialektikkurin, til endans koppaði pyramiduni. Fólkið tók sakina í egnar hendur. Valdið. Dagin eftir gekk leiðin til Louvre. Vil ráða øllum, sum bara koma í nær námind av fronsku høvuðsborgini, um at støkka inn á gólvið í hesi helst størstu listarligu oasu í øllum heiminum. Mona Lisa hongur har, brúdleypið í Kána og so høggmyndirnar hjá Michelangelo. Haðani gekk leiðin oman ímóti Sorbonne Universitetinum. Fyrsti Lærdi Háskúli í Norðureuropu. Veggmyndirnar í gøtunum siga okkum frá uppreistrinum í 68, og tað er við ikki sørt at sorglæti, at mann hugsar um, hví vit ikki eiga ein intellektuellan skansa sum hendan.

Mátti síggja gravstøðini hjá tjóðarinnar stóru synum. Panthéon. Sum tað stendur omanfyri grindina: "Aux grandes hommes la patrie reconnaissante." Serliga áhugaður var eg í gravstøðunum hjá Jean-Jaques Rousseau, Voltaire, Victor Hugo og Jean Moulin. Hesin seinasti var hann, sum samskipaði fraktiónirnar í fronsku mótstøðurørslunum andvegis nazistiska áganginum stríðsárini seinru. Eitt stórmenni, ið hevði eitt sera gott samstarv við De Gaulle, sum bardist fyri móðurlandinum úr London og serliga úr afrikansku hjálondunum og í mandatunum í Miðeystri. Tað var har hin kendi ísraelski generalurin Moshe Dayan misti annað eyga, táið hann bardist saman við frælsu fransmonnunum ímóti týskinum. Týskararnir tóku Moulin, settu hann fastan og tortureraðu hann so illa, at hann til endans kendi á sær, at mentalu bardúnirnar fóru at slitna, og at hann møguliga boygnaði so mikið sálarliga, at hann fór at siga teimum um loynidómar hjá Resistence og hinum mótstøðurørslunum. Tá royndi hann at skera seg sjálvan á háls. Tað miseydnaðist, hann kom til lívs aftur og flýddi seinri. Í 1943 tóku týskarar hann aftur, og tá beindu teir fyri honum. Sum De Gaulle segði: "Tá fall ein av tjóðarinnar alra størstu synum." Og helst hevur hann skipað tað soleiðis, at Moulin liggur grivin í hesum statsleiðinum, har bara teir alra størstu fáa rúm at liggja.

Eftir Notre-Dame var ongin tíð eftir at geva út av. Gerandisdagurin bíðaði í heimlandinum, og tað gekk sum smurt at flyta seg við loftdrekanum til Kastrup og haðani á lendingarbreytina í Vágum.

Tjóðarhátíð føroyinga bíðar. Hon er okkara. Skrúðgongan úr tinghúsinum oman í Dómkirkjuna og niðanaftur verður ikki fylgd av sama ísinkrammi, sum elti Sarkozy, táið hann fór omaneftir Champs-Élysées fyri 14 døgum síðani, men her er heldur ongin statur at verja, ikki enn. Fransmenn eru komnir til sína fimmtu republikk, her bíða vit framvegis í spenningi eftir tí fyrstu. Men harfyri eiga føroyingar at hugna sær, taka sær av løttum og at sýna blíðskap um tjóðarhátíðina. Ólavsvøkuna eiga vit, og bara vit, og hana kann í hvussu er ongin taka frá okkum. Hugnið tykkum nú so væl øll somul. Síggjast.



*Her situr ein og lesur í Libération á eini fortúnskaffistovu*